


# Miðlahúsið í apríl

Miðlahúsið 10. apríl kl. 19:

## Martin Krasnik um Islam og Vesturheim



Í sambandi við at nærri ljós er kastað á Islam og viðurskiftini millum vesturheimin og arabiska heimin, fer 34 ára gamli danski journalisturin og rithøvundurin Martin Krasnik at halda fyrilestur í Miðlahúsinum mánakvøldið 10. apríl kl. 19. Krasnik er m.a. kendur sum Deadline-vertur á DR og korrespondentur hjá Weekendeavísini í m.a. Jerusalem og New York. Í 2004 fór hann undir eina rannsóknarferð gjøgnum Iran, Libanon, Pakistan, Saudi-Arabia og London, har hann hitti og hevði samrøður við muslimskar politiskar og átrúnaðarligar leiðarar. Úrslitið var bókin "De retfærdige. En islamisk stafet", sum kom út beint undan jólum í 2005, og tað er henda bók og henda ferð hansara gjøgnum arabiska heimin, sum Krasnik fer at greiða nærri frá í Miðlahúsinum mánakvøldið 10. apríl kl. 19. Eftir tað verður pallborðsorðaskifti.

Miðlahúsið 22. apríl kl. 15:

## Marner á Lofti um ísraelar og palestinar



Ísraelsfelagið skipar fyri fyrilestri í Miðlahúsinum í Vágsbotni leygardagin 22. apríl kl. 15: "Er land fyri frið politikkurin loysnin á stríðnum millum palestinar og ísraelsmenn?"

Marner av Lofti integratiónspedagogur í Ålborg Kommunu, hugleiðir út frá vitjanum sínum í Ísrael og starvsroyndum sínum millum palestinar í Danmark. Marner av Lofti er 37 ára gamal, uppvaksin í Havn. Í 1992 fór hann til Ålborg og tók pedagogprógv fra Skipper Clement-seminariinum. Arbeiðir í løtuni í fólkaskúlanum í Ålborg við børnum av muslimskum uppruna. Marner er eisini tónleikari og sangari og hevur sjálvur skrivað løg. Hann fer at spæla og syngja í samband við hesa fyrilestrarløtuna. Eftir fyrilesturin verður ársligi aðalfundurin í Ísraelsfelagnum.

Miðlahúsið 15. apríl kl. 14:

## Føroyingar læra til flogskiparar

Fleiri og fleiri føroyngar ynskjast at gerast flogskiparar. Danska fyritøkan Karlog hevur útbúgvið fleiri føroyingar til flogskiparar og fer leiðslan á fundi í Miðlahúsinum 15. apríl kl. 14 at greiða frá møguleikunum hjá føroyingum at útbúgva seg til flogskipara á rutuflogførum. Fyritøkan stendur fyri allari útbúgvingini frá tí at næmingurin sær eitt flogfar fyri fyrstu ferð til hann er klárur til at fara til arbeiðis í einum størri flogfelag.

Miðlahúsið 20. apr. kl. 19:

## Blaðtekning og fólkaræði



Í sambandi við at tað sunnudagin 22. apríl kl. 15 letur upp stór framsýning í Norðurlandahúsinum við blaðtekningum hjá 9 norðurlendskum blaðteknarum, teirra millum okkara egna Óla Petersen verður pallborðsfundur í Miðlahúsinum hóskvøldið 20. apríl kl. 19, har m.a. kendir danskir blaðteknarar, ein íslendskur og ein norskur blaðteknari luttaka. Í døgunum frá 18. til 21. apríl hava blaðteknararnir

Blaðtekningin og fólkaræðið:

# Norðurlendskir blaðteknarar til Føroya

**22. apríl letur upp heldur óvanlig framsýning í Norðurlandahúsinum við blaðtekningum hjá níggju norðurlendskum blaðteknarum, teirra millum føroyska Óla Petersen. Dagarnar frammanundan verður fokus sett á blaðtekningina sum listagrein og miðil í samfelagsliga orðaskiftinum við verkstovu og pallborðaorðaskifti í Miðlahúsinum í Vágsbotni**

BLAÐTEKNING OG FÓLKARÆÐI
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Í sambandi við at tann týdning, sum blaðtekningin hevur fyri samfelagsliga orðaskiftið og fyri fólkaræðið sum heild – og í sambandi við at listamaðurin Óli Petersen er farin um tey sjeyti í ár – skipar Miðlahúsið í Vágsbotni fyri eini stórari norðurlendskari framsýning av blaðtekningum. Tilsamans 9 norðurlendskir blaðteknarar fara at vísa fram tekningar í Norðurlandahúsinum. Framsýningin, sum er tann fyrsta av sínum slag í Norðurlondum, letur upp 22. april kil. 15.

Talan er um eina verkætlan, sum fevnir um framsýning, verkstovu/workshop og almennan kjakfund um blaðtekningina. Endamálið er at seta fokus á leiklutin hjá blaðtekningini og týdning hennara fyri almenna orðaskiftið sum heild og serstakliga fyri orðaskiftið um fólkaræðið og støðu fólkaræðisins í dagsins samfelag. Eisini viðgerð verkætlanin blaðtekningina sum serstøk listagrein.

Verkætlanin fevnir um eina framsýning í Norðurlandahúsinum av tekningunum hjá einum íslendskum, einum norskum, einum álendskum, fimm donskum og einum føroyskum blaðteknara.

Teir norðurlendsku luttakararnir, allir kendir blaðteknarar, á framsýningini eru fyriuttan Óla Petersen eisini Sigmund Jóhannesson (Siggi) úr Íslandi, Finn Graff úr Noregi, Jan Nordlund úr Álandi og Jørgen Willumsen, Claus Seidel, Anette Carlsen, Bob K. Nielsson og Roald Als úr Danmark.

Dagarnar áðrenn framsýningin letur upp verður verkstova/workshop í Miðlahúsinum, har fleiri av luttakarunum fara at tekna skemtitekningar við støði í almenna orðaskiftinum í Føroyum og føroyskum samfelagsviðurskiftum sum heild.

Endamálið við hesum partinum av verkætlanini er, at føroyski almenningurin skal fáa innlit í heimin hjá einum blaðteknara. Tekningarnar, sum verða framleiddar á verkstovuni, verða síðani sýndar fram á sjálvari høvuðsframsýningini, sum letur upp tann 22. apríl í Norðurlandahúsinum.

Í sambandi við verkstovuna verður almennt pallborðsorðaskifti um støðuna hjá blaðtekningini við atliti at skrivi- og talufrælsinum. Eisini verður blaðtekningin sum miðil við atliti at samfelagsorðaskiftinum umrødd.

Fyriskipararnir meta, at tað hevur stóran týdning, at almenningurin í Norðurlondum fær størri kunnleika til blaðtekningar sum list og sum miðil í samfelags- og mentannarorðaskiftinum. Ætlanin eisini at fáa framsýningina setta upp í Íslandi og Danmark.






TEGNING: ROALD ALS